Juli 2025

betri trygging

Tryggingartreytir

Akfarstrygging

betri trygging

Akfarstrygging

A. Akfarstrygging 3

B. Felagstreytir 3

1.0 Nær tekur tryggingin við 3
2.0 Hvønn fevnir tryggingin um 3
3.0 Hvar fevnir tryggingin um 3
4.0 Tíðarskeið og uppsøgn 4
5.0 Tryggingargjaldið 4
6.0 Prístalsjavning 4
7.0 Tryggingarskipanir 4
8.0 Sjálvábyrgd 5
10.0 Søla av akfarinum og deponering av nummarplátunum 5

C. Ferðsluábyrgdartrygging 5

20.0 Ferðsluábyrgdartrygging 5
21.0 Hvat fevnir tryggingin um 5
22.0 Aftursókn (regress) í sambandi við ábyrgdarskaðar 6

D. Skrokktrygging 6

23.0 Hvat fevnir tryggingin um 6
24.0 Aftursókn (regress) í sambandi við skrokkskaðar 7
25.0 Eykaútgerð 7
26.0 Rættarhjálp 7
27.0 Lutvís Skrokktrygging 8
28.0 Mekaniskur skaði 9
29.0 Parkeringsskaði 9

E. Felagstreytir 9

31.0 Ósemjur 9
31.20 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging P/F 10
31.30 Kærunevndin 10
31.40 Yvirsýn 10
32.0 Samskifti 10
33.0 Hvussu viðgera vit persónsupplýsinga 10
34.0 Endurgjald fyri skaða 11
35.0 Kontant endurgjald 11
36.0 Skaðar á lakk 11
37.0 Nývirðisendurgjald 11
38.0 Serskaði 12
39.0 Endurgjald fyri virðisminking 12
40.0 Leiguakfar til uttanlandsferð 12
41.0 Leigubilur 12
42.0 Sálarfrøðilig hjálp 12
43.0 Skeiv áfylling 13
45.0 Nummarplátustuldur 13
46.0 Bilhjálp 13

F. Fólkaskaði 14

50.0 Fólkaskaði 14

Akfarstrygging

A. Lógargrundarlag

Fyri tryggingina eru galdandi, umframt hesar tryggingartreytir og viðtøkur felagsins, tær í Føroyum galdandi lógir um tryggingaravtalur og tryggingarvirksemi.

B. Felagstreytir

1.0 Nær tekur tryggingin við

1.1 Tryggingin tekur við frá teirri løtu, tá ið ein áheitan um trygging, sum felagið góðkennir, er komin felagnum í hendi, um ikki annað er avtalað.

1.2 Um tryggingarfelagið ikki hevur hug at taka tryggingina uppá seg, letur tryggingarfelagið tryggingartakaran vita hetta, og er tá leyst av tryggingini 3 dagar eftir at frásøgnin er framkomin. Um sovorðin frásøgn ikki verður send innan 3 dagar, eftir at áheitanin er komin tryggingarfelagnum í hendi, er tryggingin góðtikin.

1.3 Tekur tryggingin við í staðin fyri trygging í øðrum tryggingarfelag, tekur tryggingin við frá teirri løtu, tryggingin í hinum tryggingarfelagnum heldur uppat.

2.0 Hvønn fevnir tryggingin um

2.1 Tryggingin fevnir um tryggingartakaran, og tann, sum við loyvi frá tryggingartakaranum, nýtir akfarið ella er førari á tí.

2.2 Um akfarið er latið verkstaði til umvælingar, eftirlit ella tílíkt, svarar tryggingin bert fyri skaða, tá akfarið verður nýtt í hesum sambandi.

2.3 Um akfarið verður selt, er nýggjur eigari tryggjaður í 14 dagar eftir eigaraskifti, í tann mun onnur trygging ikki tekur við.

3.0 Hvar fevnir tryggingin um

3.1 Ferðsluábyrgdartrygging

3.1.1 Tryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

3.1.2 Uttanfyri Føroyar fevnir tryggingin um skaðar, sum henda í londum (íroknað Danmark og Grønlandi), har tað grøna kortið er galdandi. Sí tó grein 9.2 e) um koyring uttanlanda longri enn 3 mánaðar.

3.1.3 Viðvíkjandi grøna kortinum

3.1.4 Almenna heitið á grøna kortinum er "International Motor Insurance Card". Tað er DFIM (Dansk Forening For International Motorkøretøjsforsikring), sum hevur umsitingina av kortinum.

3.1.5 Grøna kortið er prógv fyri, at bilurin er ábyrgdartryggjaður. Í summum londum skal tað grøna kortið vísast, áðrenn koyrt verður inn í landið.

3.1.6 Onnur lond góðkenna ikki grøna kortið, men krevja, at trygging verður teknað við markið, áðrenn koyrt verður inn í landið.

3.1.7 Grøna kortið fæst við at venda sær til okkara.

3.2 Skrokktryggingin

3.2.1 Tryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

3.2.2 Uttanfyri Føroyar fevnir tryggingin um skaðar, sum henda í londum (íroknað Danmark og Grønlandi), har tað reyða kortið er galdandi. Sí tó grein 9.2 e) um koyring uttanlanda longri enn 3 mánaðar.

3.2.3 Viðvíkjandi reyða kortinum

3.2.4 Almenna heitið á reyða kortinum er "Forsikringsbetingelser for Redningsforsikring i Udlandet". Tað er SOS International a/s, sum hevur umsitingina av kortinum.

3.2.5 Reyða kortið er í útlandinum prógv fyri, at bilurin er skrokktryggjaður.

3.2.6 Reyða kortið er á appini "Mín Trygging" og fæst eisini við at venda sær til okkara.

3.2.7 Tryggingarfelagið kann krevja gjald fyri at skriva út grønt og/ella reytt kort.

3.3 Fólkaskaði

3.3.1 Tryggingin fevnir um skaðar, sum henda í Føroyum.

3.3.2 Uttanfyri Føroyar fevnir tryggingin um skaðar, sum henda í londum (íroknað Danmark og Grønlandi), har tað reyða og/ella grøna kortið er galdandi. Sí tó grein 9.2 e) um koyring uttanlanda longri enn 3 mánaðar.

3.4 Koyring uttanlands

Tryggingarfelagið skilar sær rætt til, við 14 daga freist at broyta treytirnar fyri koyring uttanfyri Føroyar.

Akfarstrygging

4.0 Tíðarskeið og uppsøgn

4.1 Tryggingin stendur við til tryggingartakarin ella tryggingarfelagið skrivliga siga hana upp við 30 daga freist til mánaðarlok.

4.2 Angringarrættur

4.2.1 Tryggingin kann verða strikað frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum tryggingarfelagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

4.2.2 Undantøk:

4.2.3 Angringarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, sum eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaði ella styttri.

Serligar reglur eru galdandi fyri lógarásettu ferðsluábyrgdartryggingina. Henda trygging kann ikki sigast upp uttan, at onnur trygging kemur í staðin. Nærri upplýsingar um hesar reglur kunnu fáast við at venda sær til okkara.

4.3 Vantandi viðlíkahald v.m.

4.3.1 Tryggingarfelagið kann siga tryggingina upp við 14 daga freist, um tað tryggjaða akfarið ikki er í forsvarligum standi. Tryggingarfelagið hevur altíð rætt til at lata tryggjaða akfarið sýna, og kann siga tryggingina upp við 14 daga freist um tryggingartakarin sýtir fyri hesum.

4.4 Aftaná skaða

4.4.1 Tá boðað er frá skaða, hava bæði tryggingartakarin og tryggingarfelagið rætt til at siga tryggingina upp við 14 daga freist, um hetta verður gjørt innan 1 mánað eftir at ein skaði er goldin ella avvístur.

4.5 Broyting av tryggingargjaldinum og -treytunum

4.5.1 Ger tryggingarfelagið broytingar í tryggingargjaldinum ella tryggingartreytirnar verða broyttar, hevur tryggingarfelagið rætt til við 30 daga freist til mánaðarlok, at seta nevndu broytingar í verk.

4.5.2 Vil tryggingartakarin ikki góðtaka eina hækking av tryggingargjaldinum ella strangari tryggingartreytir, kann tryggingin sigast upp av báðum pørtum við 14 daga freist.

4.6 Um so er, at tryggingarfelagið vegna tryggingartakaran hevur goldið t.d. MVG og sjálvábyrgd, kann tryggingarfelagið siga tryggingina upp við 14 daga freist, um so er, at hesi gjøld ikki vera goldin felagnum aftur rættstundis.

5.0 Tryggingargjaldið

5.1 Tryggingargjaldið og avgreiðslugjald fella til gjaldingar hvørt ár frammanundan, um ikki annað er avtalað.

5.2 Tryggingargjald og avgreiðslugjald vera kravd við inngjaldingarkorti. Tryggingarfelagið tilskilar sær rætt til at krevja postgjald ella annan innkrevjingarkostnað.

5.3 Fyrsta gjaldið fellur til gjaldingar, tá tryggingin kemur í gildi, og seinni gjøld til ásettu gjalddagarnar.

5.4 Verða tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldi ikki goldin rættstundis, verður áminningarskriv sent.

5.5 Tryggingartakarin hevur skyldu til at rinda avgreiðslugjøld fyri áminningarskriv.

5.6 Verða tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið framvegis ikki goldin, verður tryggingin strikað, og møguligur veðhavari og løgregla fáa fráboðan, til tess at nummarpláturnar kunnu verða tiknar.

5.7 Er tryggingin farin úr gildi, av tí at tryggingargjald og avgreiðslugjald ikki eru goldin, kann nýggj trygging ikki teknast, fyrr enn eftirstøðan er goldin.

6.0 Prístalsjavning

6.1 Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 1 prosenti í mun til árið fyri. Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

6.2 Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

7.0 Tryggingarskipanir

7.1 Akfarstryggingin verður teknað annaðhvørt sum trygging í stigum ella sum fastgjaldtrygging.

7.2 Trygging í stigum

7.2.1 Er tryggingin teknað, sum trygging í stigum, eru hesar reglur galdandi:

7.2.2 Tá eitt tryggingarár er umliðið, og eingin skaði hevur verið, lækkar tryggingargjaldið við einum stigi, til ein er komin á bíligasta stig. Tryggingarárið verður roknað frá tí høvuðsgjalddegi, sum stendur í tryggingarskjalinum.

Akfarstrygging

7.2.3 Tryggingargjaldið hækkar við 2 stigum fyri hvønn fráboðaðan skaða.

7.2.4 Við skaða skilst hending, sum beinleiðis ella óbeinleiðis orsakar tryggingarfelagnum útreiðslur.

7.3 Fastgjaldtrygging
7.3.1 Fyri at kunna tekna fastgjaldtrygging, skulu ávísar treytir lúkast.

7.3.2 Er fastgjaldtrygging teknað, hækkar tryggingargjaldið ikki, hóast skaði er.

7.3.3 Fastgjaldtrygging verður altíð teknað við sjálvábyrgd.

7.3.4 Um mett verður, at treytirnar fyri at tekna fastgjaldtrygging ikki longur eru til staðar, kann tryggingarfelagið til eina og hvørja tíð siga tryggingina upp ella broyta hana til eina trygging í stigum.

7.4 Váðameting
7.4.1 Vit gera váðametingar av okkara kundum. Metingin verður gjørd út frá samlaðum tryggingum og fulnaðum. Hetta merkir, at prísurin fyri tryggingarnar kann valdast av skaðagongdini á øllum tryggingum og fulnaðum.

8.0 Sjálvábyrgd

8.1 Um tryggingin er teknað við sjálvábyrgd, sæst henda á tryggingarskjalinum. Sí tó § 26.0 um Rættarhjálp.

8.2 Hevur tryggingarfelagið vegna tryggingartakaran goldið umvælara ella øðrum sjálvábyrgd, skal henda gjaldast felagnum aftur. Verður henda ikki goldið felagnum aftur rættstundis, verður áminningarskriv sent.

8.3 Tryggingartakarin skal gjalda avgreiðslugjald fyri áminningarskrivið.

8.4 Verður sjálvábyrgdin framvegis ikki goldin, kann tryggingarfelagið siga tryggingina upp við 14 daga freist.

9.0 Vandabroyting, flyting v.m.

9.1 Tryggingartakarin eigur beinanvegin at siga tryggingarfelagnum frá tá vandabroyting er, soleiðis at tryggingarfelagið kann avgera, um ella undir hvørjum treytum tryggingin kann halda fram.

9.2 Sum vandabroyting er at rokna
a) broyting av brúkinum av akfarinum,
b) broyting av sjálvum akfarinum,
c) at tryggingartakarin ella brúkari broytir bústað,
d) at brúkari verður ein annar enn tann, sum er nevndur í tryggingarskjalinum,
e) at akfarið verður brúkt uttanlands longri enn 3 mánaðar.

9.3 Verður slíkt ikki fráboðað kann tað sambært tryggingaravtalulógini §§ 45-50 føra við sær, at rætturin til endurgjald verður avmarkaður, ella at endurgjaldið fellur burtur.

10.0 Søla av akfarinum og deponering av nummarplátunum

10.1 Verður tryggjaða akfarið selt, skal tryggingartakarin boða felagnum frá hesum beinanvegin.

10.2 Um nummarpláturnar verða deponeraðar, hvílir tryggingin frá deponeringsdegnum.

10.3 Tryggingaravtalan kann ikki flytast ella latast triðja manni.

10.4 Óavgreiddir skaðar kunnu bert flytast ella latast triðja manni við góðkenning frá felagnum.

C. Ferðsluábyrgdartrygging

20.0 Ferðsluábyrgdartrygging

20.1 Í Føroyum veitir tryggingin endurgjald sambært teim tryggingarhæddum, sum eru nevndar í galdandi ferðslulóg.

20.2 Uttanfyri Føroyar veitir tryggingin endurgjald sambært teim tryggingarhæddum, sum eru galdandi í viðkomandi landi.

20.3 Tryggingarfelagið hevur heimild at gera semju í spurninginum um endurgjald.

20.4 Tryggingartakarin hevur skyldu til at geva felagnum fulltrú til sína vegna at føra møguligt rættarmál og samráðingar.

20.5 Umframt endurgjaldið rindar tryggingarfelagið eisini kostnað, ið stendst av endurgjaldskravinum og rentu av endurgjaldinum.

21.0 Hvat fevnir tryggingin um

21.1 Ferðsluábyrgdartryggingin fevnir um endurgjaldsábyrgd sambært tí lóggávu, sum er galdandi í tí landi, har skaðin hendir.

Akfarstrygging

21.2 Hvat fevnir tryggingin ikki um
21.3 Ferðsluábyrgdartryggingin fevnir ikki um persónsskaða á føraran av akfarinum.

21.4 Tryggingin fevnir bert um persónsskaða á tryggingartakaran, um hann ikki er førari av akfarinum.

21.5 Skaða á lutir ella aðra ogn hjá førara, brúkara, tryggingartakara, hjúnafelaga/sambúgva hansara/hennara, ella virki, sum hesi heilt ella partvíst eiga.

21.6 Skaða á viðfest akfar ella útbúnað.

21.7 Skaða, sum hendir, tá akfarið er útleigað.

21.8 Skaða, sum hendir, tá akfarið er á verkstaði, hjá umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til um vælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt hava akfarið í varðveitslu, uttan so at koyringin kann sigast at hava verið neyðug til tess at røkja áhugamál tryggingartakarans.

22.0 Aftursókn (regress) í sambandi við ábyrgdarskaðar

22.1 Tryggingarfelagið hevur regress móti tí, sum eftir ferðslulógini hevur ábyrgd av skaðanum, og sum hevur elvt skaðan við vilja.

22.2 Er skaðin elvdur av grovum ósketni, verður avgjørt út frá eini meting av skyldmuninum og umstøðunum yvirhøvur, um tryggingarfelagið hevur regress, og um so er, í hvønn mun.

22.3 Tryggingarfelagið hevur eisini regress, um so er, at skaðin er elvdur, meðan akfarið hevur verið útleigað uttan førara.

22.4 Harumframt hevur tryggingarfelagið regress fyri peningahæddir, ið tað hevur havt skyldu til at lata í endurgjaldi fyri tilburðir, sum tryggingin ikki fevnir um, ella tilburðir, sum hava verið eftir, at akfarið er selt.

D. Skrokktrygging

Er skrokktrygging teknað, sæst hetta í tryggingarskjalinum

23.0 Hvat fevnir tryggingin um

23.1 Skrokktryggingin fevnir, við niðanfyri nevndu undantøkum um allar skaðar á tað tryggjaða akfarið, eisini stuldur av akfarinum.
23.2 Um akfarið bert er brunatryggjað, fevnir tryggingin um skaða sum stendst av eldi, spreinging, streymvillu og toruniðursláttri.

23.3 Hvat fevnir tryggingin ikki um
23.3.1 skaðar, sum bert koma á, og eru avmarkaðir til mekaniskar og elektriskar lutir á akfarinum (so sum motor, girskipan, stýrilutir, elektroniska stýri- og eftiransingarskipan), uttan so, at skaðin er elvdur av eldi, spreinging, streymvillu, toruniðurslátti, stuldri, herverki ella undir flutningi á ella við øðrum flutningstóli,

23.3.2 skaðar, sum koma á akfarið ella lutir tess, undir og í sambandi við arbeiði ella viðgerð av hesum, uttan so, at skaðin er hendur av koyrsluóhappi,

23.3.3 skaðar ella stuldur av akfari, meðan bilurin er latin verkstaði, umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt hava í varðveitslu. Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er at skaðin er komin, tá koyrt verður, av eldi ella í bilvaskimaskinu, sí § 2.2,

23.3.4 skaðar, sum eru hendir av veðurlagnum (so sum rustur og frostspreingingar),

23.3.5 skaðar, sum henda av evnistroyttleika,

23.3.6 virðisminking av akfarinum, orsakað av nýtslu, íroknað slit, steinslag í lakk, skøvur o.t.,

23.3.7 skaðar á gummi, um motorakfarið ikki hevur fingið annan skaða, uttan so, at skaðin er elvdur av eldi, spreinging, streymvillu, toruniðurslátti, stuldri, herverki ella undir flutningi á ella við øðrum flutningstóli,

23.3.8 skaðar á glas uttan so, at tað er brotið. Glas verður sostatt ikki skift ella umvælt av kosmetiskum orsøkum,

23.3.9 skaðar á lakk orsakað av steinslagi. Eru fleiri støkk á skadda lutinum, sum týðiliga stava frá somu hending, er talan ikki um steinslag, men um lakkskaðar, sum tryggingin fevnir um. Sí § 36.0 um Skaðar á lakk,

23.3.10 skaðar, um standast av koyring við ongum ella ov lítlum vatni ella olju,

23.3.11 skaðar, sum henda, meðan bilurin verður leigaður út,

23.3.12 miss ella stuldur av brennievni,

Akfarstrygging

23.3.13 skaðar, sum eru elvdur við vitandi og vilja, av ovurhuga ella ósketni sambært tryggingaravtalulóg § 18,

23.3.14 skaðar, sum henda, meðan akfarið var ført av persóni, sum var ávirkaður av rúsandi evnum sambært tryggingaravtalulóg § 20,

23.3.15 skaðar, sum henda, meðan akfarið var ført av persóni, sum ikki hevði lógkravt koyriprógv,

23.3.16 skaðar, sum standast av, at akfarið hevur eitt ella fleiri dekk, sum ikki lúka/r tey minstukrøv, sum almennar reglur fyriskriva til mynsturdýbd smbrt. lóg ella kunngerð,

23.3.17 Tryggingartakarin er tó fevndur av tryggingini, tá talan er um skaðatilburðir, sum nevndir eru undir §§ 23.3.13 – 23.3.16, um so er, at tryggingartakarin ikki koyrdi bilin og ikki visti, at talan var um nevndu umstøður, treytað av, at tað ikki var av grovum ósketni, at hann ikki visti um hesi viðurskifti.

Tryggingartakarin er tó ikki fevndur av tryggingini í hesum førum

a) tá hjúnafelagi/sambúgvi tryggingartakarans var førari,
b) tá onkur av børnum tryggingartakarans, sum búgva heima, var førari,
c) tá tann, sum sambært tryggingarskjalinum er brúkari, var førari.

23.3.18 Tryggingin fevnir bert um stuldur úr akførum, um tey eru forsvarliga læst. Tað er ein treyt, at tað sæst tekin á akfarinum um, at tað er brotið upp við makt.

24.0 Aftursókn (regress) í sambandi við skrokkskaðar

24.1 Hevur tryggingarfelagið havt skyldu til at rinda endurgjald fyri ein skaða, sum ikki er fevndur av skrokk-/eldtryggingini, hevur tryggingarfelagið regress móti skaðavoldaranum, sum hevur ábyrgdina.

25.0 Eykaútgerð

25.1 Umframt fyri sjálvt akfarið verður endurgjald veitt upp til ta tryggingarhædd (íroknað íseting, arbeiðsløn og MVG), sum er nevnd í tryggingarskjalinum, fyri eykaútgerð.
Tryggingin fevnir bæði um festa og leysa/avmonterøða eykaútgerð.

25.2 Fest eykaútgerð er:
Festir eykalutir, radio, fløguspælarar, alufelgur, serligar lakkeringar, lækkingarútgerð, spoilarar, gáttir, innrætting, tekstir, myndir o.tíl., sum er málað, líma ella á annan hátt fest á akfarið.

Tað, at ein lutur er fest eykaútgerð, merkir at hann er forsvarliga festur í akfarið.

25.3 Leys eykaútgerð er:
Útgerð og tilhoyr til tryggjaða akfarið, sum annaðhvørt er avmonterað ella ikki fest. Talan kann t.d. vera um vetrar- og summardekk, eykalutir og amboð, ið einans verða nýtt til tryggjaða akfarið.

Í sambandi við innbrot, er tað ein treyt fyri endurgjaldi, at lutirnir eru í forsvarliga læstum akfari/rúmi. Tað er ein treyt, at tekin vísa, at brotið er upp við makt.

25.4 Talan er um 1. risikotrygging. Hetta merkir, at undirtrygging ikki verður gjørd galdandi.

26.0 Rættarhjálp

26.1 Tryggingin fevnir um rættarhjálp.

26.2 Fulnaður verður veittur sambært tryggingartreytunum fyri rættarhjálpartrygging, sum Forsikring og Pension ásetir fyri tryggingarfeløg. Tryggingartreytirnar finnast á heimasíðuni www.forsikringsoplysningen.dk og verða útflýggjaðar eftir áheitan.

26.3 Alment kann sigast, at rættarhjálpartryggingin fevnir um ein part av útreiðslum tryggingartakarans í sambandi við ávísar ósemjur, ið tryggingartakarin sum eigari, brúkari ella førari av skrokktryggjaða bilinum er partur í. Endurgjaldið kann í mesta lagi vera kr. 200.000 og sjálvábyrgdin er 10% av útreiðslunum – tó í minsta lagi kr. 2.500.

26.4 Um økonomisku treytirnar fyri at fáa fría rættarmálsførslu eru loknar, skal eingin sjálvábyrgd gjaldast.

26.5 Fyri at fáa rættarhjálp skal tryggingartakarin seta seg í samband við advokat. Heldur advokaturin, at møguleiki er fyri at fáa rættarhjálp, skal advokaturin biðja tryggingarfelagið um at veita rættarhjálp tryggingartakarans vegna. Tryggingarfelagið skal síðani taka endaliga støðu. Í sambandi við, at advokaturin skal meta um møguleikarnar fyri fríari rættarførslu, skal tryggingartakarin lata advokatinum skattauppgerð fyri seg sjálvan og hjúnafelaga/sambúgva.

Akfarstrygging

27.0 Lutvís Skrokktrygging

Er lutvís skrokktrygging teknað, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

27.1 Hvørjar lutir fevnir tryggingin um

1. Tryggingin fevnir um fram-, bak- og síðurútar, umframt spegl og lyktir á akfarinum.
2. Í sambandi við stuldur ella raðherverk fevnir tryggingin um sjálvt akfarið.
3. Útgerð, sum verksmiðja ikki hevur fest í akfarið, verður endurgoldin við upp til kr. 20.000, íroknað íseting, arbeiðsløn og mvg.
4. Tónleikaútgerð, samskiftisútgerð og navigationsútgerð, sum er fest av framleiðara ella innflytara – tó ikki avmonterað útgerð ella fløgur/dvd.
   Við festa útgerð er at skilja útgerð, sum er bóltað, skrúvað, sveisað ella líknandi, og er fest á skrokkin ella instrumentbrettið soleiðis, at neyðugt er at brúka amboð fyri at loysa lutirnar.
5. Harumframt fevnir tryggingin um amboð og lutir til akfarið í vanligum høpi – t.d. vetrar- og summardekk, súkkluhaldara, viðførisbera v.m.

27.2 Hvørjar skaðar fevnir tryggingin um

Lutvísa skrokktryggingin fevnir um:

1. Skaðar sum henda á fram-, bak- og síðurútar, umframt á spegl og lyktir á tryggjaða akfarinum. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at annar skaði á akfarið ikki hendir samstundis. Ein sjálvsábyrgd er galdandi, tá nevndu lutir vera útskiftir. Sjálvábyrgdin sæst á tryggingarskjalinum.
2. Eld, spreinging, skammlop ella skaða av, at toran slær niður.
3. Rán av bilinum. Við rán er at skilja stuldur av bilinum farin fram undir nýtslu av ella hóttanum um at nýta vald við tað sama. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at hesir skaðar eru fráboðaðir løgregluni.
4. Stuldur av læstum akfari, og skaða í hesum sambandi. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at hesir skaðar eru fráboðaðir løgregluni.
5. Skaðar av raðherverki. Við raðherverk er at skilja: Skaðar hendir í óndari ætlan á tvey ella fleiri akfør á sama øki og innan fyri sama tíðarbil. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at hesir skaðar eru fráboðaðir løgregluni.
6. Skaðar, sum eru elvdir av lutum, ið detta niður/oman, t.d. lutir, sum fúka niður av einum húsi. Tað, at lutir fara um koll, t.d. súkklur ella aðrir lutir, og detta móti bilinum, eru ikki at meta sum omandotnir lutir.

27.3 Lutvísa skrokktryggingin fevnir ikki um:

1. Framleiðslu- og konstruksjónsbrek.
2. Vanligt slit.
3. Skaða, sum einans er í og er avmarkaður til mekanisku og elektrisku lutirnar (t.d. motor, girskipan, stýrislutir og elektronisku stýri- og eftiransingarskipan).
   Tryggingin fevnir tó um hesar skaðar, um so er, at skaðin stendst av eldi, stuldri, herverki ella av toruniðurslátri.
4. Stuldur, meðan akfarið er latið verkstaði, umvælara, sølufólki og øðrum, sum hava akfarið til umvælingar, tænastueftirlit, sølu ella á annan hátt í varðveitslu.
5. Skaða, sum kemur á akfarið undir umvæling, ella tá arbeitt verður upp á tað, antin tað er á verkstaði ella privat.
6. Skaða sum hendir av veðurlagnum (sum t.d. frostspreinging).
7. Skaðar á glas uttan so, at tað er brotið. Glas verður ikki skift ella umvælt av kosmetiskum orsøkum.
8. Miss og stuldur av brennievni.
9. Útreiðslur til leiguakfar.
10. Lutir, ið verða brúktir vinnuligt.
11. Skaða sum er elvdur við vilja, við grovum ósketni ella undir ávirkan av rúsdrekka, heilivági ella narkotika, sí §§ 18 og 20 í Tryggingaravtalulóguni.
12. Skaðar, sum henda, tá tann, sum koyrir akfarið, ikki hevur lógarásett koyrikort.
13. Skaða, sum stendst av, at akfarið hevur eitt ella fleiri niðurslitin dekk, ella ikki er skøtt eftir umstøðunum.

Tryggingartakarin er tó fevndur av tryggingini, tá talan er um skaðatilburðir, sum nevndir eru í grein 27.3, nr. 11–13, um so er, at tryggingartakarin ikki koyrdi akfarið og ikki visti, at talan var um nevndu umstøður, treytað av, at tað ikki var av grovum ósketni, at hann ikki visti um hesi viðurskifti.

Tryggingartakarin er tó ikki fevndur av tryggingini í hesum førum:

1. Tá hjúnafelagi/sambúgvi tryggingartakarans var førari.
2. Tá onkur av børnum tryggingartakarans, sum búgva heima, var førari.
3. Tá tann, sum er fastur brúkari, var førari.

14. Stuldur av akfarinum og skaða í hesum sambandi, um akfarið var ólæst, og lykilin lá í akfarinum, ella akfarið var í gongd, tá stuldurin fór fram.
15. Skaða á glas- og sóltak.
16. Nývirðisendurgjald sambært grein 37.0

27.4 Hevur felagið havt skyldu til at rinda endurgjald fyri ein skaða, sum ikki er fevndur av Lutvísu Skrokktryggingini, hevur felagið aftursóknarkrav móti skaðavoldaranum, sum hevur ábyrgdina.

Akfarstrygging

28.0 Mekaniskur skaði

Er trygging móti mekaniskum skaða teknað, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

28.1 Tryggingin fevnir um
Hóast ásetingarnar í § 23.3.1 um at tryggingin ikki fevnir um skaðar, sum bert koma á og eru avmarkaðir til mekaniskar og elektriskar lutir á akfarinum, er tryggingin víðkað til at fevna um slíkar skaðar.

28.2 Tað ein treyt fyri endurgjaldi, at:
1. Akfarið hevur verið til øll eftirlit, ið fyriskrivað eru í trygdar- og eftirlitsbókini hjá bilasøluumboði á góðkendum verkstaði.
2. Trygdar- og eftirlitsbókin er útfylt og undirskrivað.
3. Krøv og tilráðingar í trygdar- og eftirlitsbókini eru fylgd.

28.3 Tó eru hesir lutir undantiknir tryggingini:
1. Útstoyt: Katalysator, ljóðdoyvari, partikkelfiltur og útstoytsrør
2. Bremsur: Klossar, skivur, bremsurør og bremsutrumlur
3. Hjóllegur: Gardankryss og manskettur
4. Upphang: Búsningar, stabilisatorstong, stýrilið og upphangskúlur
5. Lutir so sum: Stoytdoyvarar, fjarðabein og battarí.

28.4 Tryggingin fevnir ikki um:
1. skaða, ið er fevndur av garantii.

Tó rindar tryggingin fyri skaða, um so er, at tryggingartakarin ikki fær skaðan góðkendan sum garantiskaða, og grundgevingin ikki er í stríði við ásetingarnar í undantøkunum.

2. Skaðar, sum bert koma á og eru avmarkaðir til slitlutir og sum henda av evnistroyttleika, sliti ella rusti og sum sambært trygdar- og eftirlitsbókini skuldu verið útskiftir.

28.5 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at akfarið ikki er eldri enn 5 ár frá fyrstu skráseting og/ella í mesta lagi hevur koyrt 200.000 km.

28.6 Sjálvábyrgdin sæst á tryggingarskjalinum.

29.0 Parkeringsskaði

Er trygging móti parkeringskaða teknað, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

29.1 Parkeringstryggingin fevnir um skaða á tryggjaða akfarið, sum verður framdur av ókendum skaðaelvara, tá akfarið er parkerað á lóglig hátt og á lógligum stað.

29.2 At akfarið er parkerað merkir, at førarin hevur sett tað frá sær. Tað hevur ikki týdning, hvørt førarin er í akfarinum ella ikki.

29.3 Steðgur í ferðsluni ella steðgur í sambandi við at komið verður í akfarið ella farið verður úr tí, eins og at lutir verða tiknir úr akfarinum ella latnir í akfarið, eru ikki at meta sum at akfarið er parkerað.

29.4 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at tilburðurin er fráboðaður løgregluni, og at váttan um fráboðanina er latin okkum.

29.5 Endurgoldið verður í mesta lagi fyri ein skaða um árið.

29.6 Eingin sjálvábyrgd er galdandi.

E. Felagstreytir

30.0 Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum er elvdur av

30.1 kríggi, krígslíknandi tilburðum, uppreistri, skaðagerðum elvdar av uppøstari mannamúgvu,

30.2 verkfalli ella verkbanni,

30.3 jarðskjálvta ella øðrum náttúrutilburðum,

30.4 útloysing av atommegi ella radioaktivum kreftum, uttan mun til um hetta er beinleiðis ella óbeinleiðis orsøk til skaðan, um ikki so er, at tryggingartakarin kann prógva, at skaðin er ikki elvdur av nøkrum av nevndu tilburðum,

30.5 ella er hendur undir lendis- og rasarakoyring ella venjing til tílíka koyring, umframt alla koyring á breyt ella øki, sum er avbyrgt til endamálið,

30.6 spreingievni, sum akfarið førir, uttan mun til um spreingievnið var orsøk til skaðan ella økti um hann.

31.0 Ósemjur

31.10 Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg í samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

Akfarstrygging

31.11 Talan kann vera um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaða-avgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

31.12 Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

31.13 Um semja ikki fæst, eru tríggir møguleikar at fara víðari við málinum, sí §§ 31.20 - 31.40

31.20 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging P/F

31.21 Kærast kann til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging.

31.22 Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

31.23 Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er farið fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

31.24 Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:

Betri Trygging P/F
Kæruviðgerin
Kongabrúgvin
Postsmoga 34
FO-110 Tórshavn
ella við teldubrævi til: kaera@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

31.30 Kærunevndin
31.31 Kærast kann eisini til donsku kærunevndina, Ankenævnet for Forsikring.

31.32 Skrivlig kæra – skrivað á donskum – skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

31.33 Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður. Sí: http://www.ankeforsikring.dk

31.34 Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

31.35 Kæran skal sendast til:

Ankenævnet for Forsikring
Anker Heegaardsgade 2
Postbox 360
1572 København V.
Tlf. nr.: 0045 33 15 89 00

31.40 Yvirsýn
31.41 Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu trygging-artakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

31.42 Metingarmennirnir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein uppmann, sum eisini skal verða óheftur. Koma teir ikki ásamt um uppmann, velur Sorinskrivarin hann.

31.43 Metingarmennirnir gera uppgerðina í neyvum samstarvi við ásetingarnar í tryggingartreytunum og -skjalinum og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

31.44 Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar. Koma metingarmennirnir ikki ásamt um skaðauppgerðina, er tað uppmaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingar-mennirnir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingarmennirnir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýninum verður at býta millum partarnar.

32.0 Samskifti

32.1 Sum útgangsstøði samskifta vit á føroyskum.

32.2 Allir kundar hjá Betri Trygging hava atgongd til appina Mín Trygging.
Á appini fært tú eitt yvirlit yvir tínar tryggingar, eins og skaðar og annað samskifti liggur á appini. Vit samskifta eisini leypandi við kundarnar umvegis Mín Trygging appina. Eitt nú tá treytir verða broyttar og dagførdar, ber tað til at síggja hetta á appini. Tað er týdningarmikið, at boð, sum verða send á Mín Trygging, verða latin upp og lisin eins og vanligur postur ella teldupostur.

33.0 Hvussu viðgera vit persónsupplýsingar

33.1 Les um okkara persónsdátapolitikk á www.trygging.fo. Har kanst tú kunna teg um hvørjar persónar vit viðgera persónsupplýsingar hjá, hvørjar upplýsingar vit savna inn,

Akfarstrygging

hvaðani vit fáa tær, hvørjum vit lata upplýsingarnar, og hvussu leingi vit goyma tær.

34.0 Endurgjald fyri skaða

34.1 Tryggingin veitir endurgjald upp til ta peningahædd, sum akfarið er vert, tá ið skaðin hendi.

34.2 Tryggingarfelagið hevur rætt til antin at javna skaðan við peningagjaldi í hondina ella lata akfarið ella tess einstøku lutir umvæla ella gera av nýggjum.

34.3 Tryggingarfelagið hevur rætt til at gera av, hvar skaðin skal sýnast og umvælast.

34.4 Meirútreiðslur av umvælingini orsakaðar av, at arbeitt verður út um vanliga arbeiðstíð, verða ikki goldnar.

34.5 Tryggingarfelagið afturrindar útreiðslurnar av at flyta tað skadda akfarið til nærmasta umvælingarstað.

34.6 Tryggingarfelagið rindar einans fyri umvæling av skaddu lutunum. Sum dømi kann nevnast, at tryggingarfelagið ikki endurrindar fyri litmun aftaná lakering ella mun á felgum aftaná umvæling ella útskifting av eini ella fleiri felgum.

34.7 Tryggingin hevur ikki ábyrgdina av, at eykalutir, sama slag sum teir skaddu, ikki kunnu útvegast.

34.8 Minkar handilsvirðið á akfarinum av umvælingini ella skaðanum, verður henda virðisminking ikki endurgoldin.

34.9 Hevur umvælingin við sær, at akfarið verður í betri standi enn frammanundan (t.d. at bøtt verður um tering ella slit), skal tryggingartakarin sjálvur rinda tann partin av umvælingarútreiðslunum, sum svarar til virðishækkanina.

34.10 Tryggingarfelagið kann ikki ábyrgdast fyri brek við arbeiðinum, sum verkstaðið hevur ábyrgdina av.

34.11 Hendir skaði, meðan akfarið er latið verkstaði ella umboði til umvælingar ella sølu, skal umvælingin, sum kann fara fram á verkstaði hjá hesum, verða gjørd til nettoprís. Skaðar, sum verða umvældir á øðrum verkstaðum, verða goldnir við tí upphædd, sum skaðaelvandi verkstaðurin vanliga má gjalda fyri slíka umvæling av tilsvarandi akfari.

35.0 Kontant endurgjald

35.1 Er skaðin so stórur, at tryggingarfelagið heldur, at umvælingin loysir seg ikki, ella er akfarið stolið ella rænt og er ikki afturfingið innan 30 dagar, eftir tað at løgreglan er fráboðað, verður endurgjaldið sett til virði av tilsvarandi akfari.

35.2 Tó kann endurgjaldið verða lækkað, tá hædd verður tikin fyri fyrimun av gjalding í hondina, avskriving vegna slit, aldri, broytingum ella undanfarnum skaðahendingum.

35.3 Tryggingarfelagið kann velja, um tað vil taka við tí skadda akfarinum ella draga virðið av vrakinum frá í endurgjaldinum.

36.0 Skaðar á lakk

36.1 Skaðar á lakk verða endurgoldnir soleiðis:

Aldur í árum	Koyrdir km	Endurgjald í %
0-3	60.000	100
3-5	60.000	90
5-7	100.000	70
7-9	140.000	50
9 og eldri	160.000 og fleiri	30

36.2 Endurgjaldið lækkar, tá onnur av teimum báðum ásetingunum í 1. ella 2. rað er lokin.

36.3 Dømi:

1. Eitt akfar, sum er 3½ ára gamalt og hevur koyrt 50.000 km, fær 90% í endurgjaldi fyri lakkskaðar.
2. Eitt akfar, sum er 3½ ára gamalt og hevur koyrt 100.000 km, fær 70% í endurgjaldi fyri lakkskaðar.

36.4 Goldið verður bert fyri tann partin av akfarinum, sum er skaddur.

37.0 Nývirðisendurgjald

37.1 Tryggingartakarin hevur rætt til eitt endurgjald, ið svarar til kostnaðin fyri eitt tilsvarandi verksmiðjunýtt akfar av sama merki, slagi og árgangi sum tað skadda, um:

37.1.1 umvælingarkostnaðurin er hægri enn 50% av nývirðinum á akfarinum,

37.1.2 skaðin er hendur innan fyrsta árið við fyrstu skráseting,

37.1.3 skadda akfarið var verksmiðjunýtt, tá tryggingin varð teknað.

Akfarstrygging

37.2 Møguligur avsláttur, sum tryggingarfelagið kann fáa við keyp av nýggjum akfari, verður ikki goldin tryggingartakaranum.

37.3 Nývirðisendurgjaldið fevnir eisini um demobilar. Tað er tó ein treyt fyri at demobilar kunnu verða mettir sum verksmiðjunýggir, at teir:

1. Í mesta lagi hava koyrt 3000 km.
2. Eru yngri enn 3 mánaðir frá fyrstu skráseting
3. Einans hava verið nýttir sum demobilar.

38.0 Serskaði

38.1 Gevur tryggingin rætt til serskaða, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

38.2 Tryggingargjaldið hækkar ikki, og eingin sjálvábyrgd verður kravd, um skaðin er hendur

- **a)** av eldi, spreinging, streymvillu, toruniðursláttri, omanlopi og stuldri av og úr forsvarliga læstum akførum,
- **b)** av herverki, tá tað kann prógvast, hvør skaðavoldarin er, og skal hesin ikki vera førur fyri sjálvur at endurgjalda skaðan,
- **c)** meðan akfarið er latið verkstaði til umvælingar ella líknandi, ella við eigaraskifti – sí §§ 2.2 og 2.3,
- **d)** orsakað av skaðaelvara, hvørs ábyrgd fellur burtur smbrt. galdandi lóggávu um regress (aftursókn),
- **e)** bert á glas. Um glasið verður umvælt er eingin sjálvábyrgd. Verður glasið útskift er sjálvábyrgdin kr. 1.500.
- **f)** á seyð einans.

39.0 Endurgjald fyri virðisminking

39.1 Gevur tryggingin rætt til endurgjald fyri virðisminking, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

39.2 Um so er, at akfarið verður umvælt eftir skaða, og útreiðslurnar fara upp um 40% av keypskostnaðinum fyri eitt tilsvarandi akfar av sama merki, slagi og árgangi, sum tað skadda, verður endurgjald goldið fyri virðisminking uppá 15% av umvælingarkostnaðinum, um so er, at skaðin hendir innan tey fyrstu 3 árini eftir fyrsta skrásetingardagin hjá akfarinum.

39.3 Endurgjaldið kann ikki fara upp um kr. 10.000.

39.4 Er akfarið eldri enn 3 ár, verður ikki latið endurgjald fyri virðisminking.

40.0 Leiguakfar til uttanlandsferð

40.1 Tryggingin fevnir um útreiðslur at leiga annað akfar, um so er, at akfarið hjá tí tryggjaða verður skatt í Føroyum, og sum skrokktrygging fatar um, og tí ikki kann gera ferðina. Endurgjald verður bert latið, um ferðatrygging er teknað hjá Betri Trygging.

40.2 Tryggingin fevnir bert um útreiðslur av leiguakfari í sambandi við skrokkskaða, sum er hendur aftan á at ferðin er keypt.

40.3 Tryggingin rindar billeigu upp í 2 dagar, áðrenn ferðin byrjar og til dagin eftir, at tann tryggjaði er heimafturkomin. Endurgjaldið kann ikki fara upp um kr. 25.000.

41.0 Leigubilur

41.1 Gevur tryggingin rætt til endurgjald fyri leigubil, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

41.2 Umvælingar

- **a.** Tá talan er um umvælingar, verður endurgoldið við í mesta lagi kr. 300 um dagin í í mesta lagi 14 dagar. Goldið verður ikki fyri leigubil meðan bíðað verður eftir eykalutum ella fyri halgi-, leygar- ella sunnudag og aðrar almennar frídagar.
- **b.** Endurgjaldið kann í mesta lagi vera kr. 5.000.
- **c.** Tað verður ikki veitt endurgjald til leigubil, um skaðin er kr. 4.000 ella minni.
- **d.** Eingin sjálvábyrgd er fyri leigubil.

41.3 Totalskaði v.m.

Er talan um totalskaða ella nývirðisendurgjald verður veitt, er endurgjaldið í mesta lagi kr. 3.000.

41.4 Stuldur

- **a.** Tryggingin veitir endurgjald frá tí degi akfarið er horvið, somuleiðis fyri hvønn dag sum, sambært sýnsmanni, fer til umvæling, eftir at akfarið er afturkomið, ella fyri at staðfesta, um totalskaði fyriliggur.
- **b.** Endurgoldið verður í mesta lagi kr. 300 um dagin í 30 dagar.

41.5 Tað er ein treyt fyri at fáa endurgjald til leigubil, at leigað verður frá góðkendum bilútleigara og at tryggingar-takarin letur tryggingini skjalprógv fyri útreiðslurnar av billeiguni.
Tryggingin fevnir ikki um útreiðslur til at leiga akfar frá privatum.

42.0 Sálarfrøðilig hjálp

42.1 Treytað av læknaváttan, veitir Betri Trygging fíggjarliga hjálp til sálarliga kreppuhjálp til tey tryggjaðu, um tey koma í

Akfarstrygging

eina bráðfeingis sálarliga kreppu orsakað av:
1. At eldur ella eksplosjón var í bilinum, meðan tryggjaðu vóru stødd í bilinum.
2. Skaða, fevndur av tryggingini, sum hevur kostað mannalív.
3. At hóttandi vandi var fyri mannalívi orsakað av skaða, sum tryggingin fevndi um.
4. At bilurin var rændur, meðan tey tryggjaðu vóru stødd í bilinum.

42.2 Endurgjald verður veitt fyri upp til 10 viðtalur hjá sálarfrøðingi fyri hvønn tryggjaðan pr. skaðahending.

42.3 Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið tryggjaði ikki fær endurrindaðar frá øðrum, t.d. frá Heilsutrygd, sjúkratrygging, aðrari trygging ella verða endurgoldnar av almenna heilsuverkinum.

43.0 Skeiv áfylling

43.1 Tryggingin veitir endurgjald, um so er at skeivt brennievni er latið á akfarið.

43.2 Endurgjaldið fevnir um útreiðslur til at:
1. tøma og reinsa brennievnistangan
2. lata rætt brennievnið á bilin
3. bungsera, um tað er neyðugt.

43.3 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at akfarið ikki er flutt av økinum, har skeiva brennievnið er latið á.

43.4 Endurgjaldið er í mesta lagi kr. 4.000 pr. skaða. Goldið verður bert fyri ein skaða árliga.

43.5 Eingin sjálvábyrgd er galdandi og tryggingargjaldið hækkar ikki, eftir ein skaða av skeivari áfylling.

45.0 Nummarplátustuldur

45.1 Tryggingin fevnir um nummarplátustuldur.

45.2 Endurgjaldið fevnir um útreiðslurnar av at fáa til vega nýggja vanliga nummarplátu.

45.3 Endurgoldið verður fyri ein nummarplátustuldur árliga.

45.4 Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at:
1. Nummarplátan var fest á rættan og lógliga hátt
2. stuldurin er fráboðaður løgregluni
3. stuldurin er fráboðaður Akstovuni.

45.5 Eingin sjálvábyrgd er galdandi.

46.0 Bilhjálp

46.1 Gevur tryggingin rætt til endurgjald fyri bilhjálp, sæst hetta á tryggingarskajlinum.

46.2 Tryggingin fevnir um útreiðslur til kranabil, tænastubil, og hjálp til at seta tryggjaða akfarið í gongd o.l. í sambandi við:
1. Ferðsluóhapp
2. Tá akfarið er koyrt fast
3. Motorsteðg o.l.
4. Stuldur av akfarinum
5. At opna læsta bilhurð
6. Brádliga sjúku hjá førara

46.3 Tryggingin fevnir um akfarið, sum tryggingin sambært tryggingarskjalinum fevnir um, íroknað húsvogn ella tjaldvogn, um hesir eru festir í akfarið.

46.4 Kann akfarið ikki gerast aftur á staðnum ella á næsta verkstaði, fevnir tryggingin um flutning av akfarinum til bústaðin ella til nærmasta góðkenda verkstað.

46.5 Tryggingin fevnir ikki um:
1. Nýtslu av eykalutum, olju, brennievni og arbeiðsløn í sambandi við umvæling av brekinum. Hetta er galdandi fyri umvælingar bæði á staðnum, har óhappið hendi, ella á verkstaði. Kann skaðin ella brekið fyribils ella endaliga gerast aftur á staðnum, rindar Betri Trygging tó arbeiðslønina í hesum sambandi.
2. Útreiðslurnar til møguliga seinni endaliga umvæling av skaðanum ella brekinum.
3. Bilhjálp á øki, ið ikki er partur av vegakervinum.

46.6 Tryggingin tekur ikki við, um so er, at útreiðslurnar eru fevndar av aðrari trygging t.d. skrokktrygging, flutningstrygging ella ábyrgdartrygging hjá skaðaelvara.

46.7 Endurgoldið verður í mesta lagi fyri tvær veitingar av bilhjálp um árið og við í mesta lagi kr. 50.000 árliga.

46.8 Hvussu verður biðið um hjálp
Ring til Betri Bilhjálp á telefon 348600 ella 548888. Saman við tær, meta vit um tørvin á hjálp og hvussu hjálpin best verður veitt undir verandi umstøðum.

46.9 Fráboðan av útreiðslum
1. Hevur tú fingið rokning fyri flutningin ella hjálpina, skal rokningin sendast Betri Trygging vísandi til tryggingar-skjalsnummar og við frágreiðing um gongdina.

Akfarstrygging

2. Hevur tú goldið fyri hjálpina, verður kvittaða rokningin send Betri Trygging vísandi til tryggingarskjalsnummar og við frágreiðing um gongdina. Upplýsast skal konto nr. har peningurin skal flytast.

46.10 Eingin sjálvábyrgd er fyri bilhjálp.

F. Fólkaskaði

50.0 Fólkaskaði

Er trygging móti fólkaskaða teknað, sæst hetta á tryggingarskjalinum.

50.1 Tryggingin gevur rætt til endurgjald fyri vanlukkutilburð, ið stendst av ferðsluóhappi, tá ið tann tryggjaði er í akfarinum, sum nevnt er í tryggingarskjalinum. Sum ferðsluóhapp verður eisini roknaður skaði, ið hendir meðan farið verður í ella úr akfarinum.

50.2 Við vanlukkutilburð er at skilja ein brádlig hending, ið elvir til likamsskaða.

50.3 Hvønn fevnir tryggingin um

Um ikki annað er tilskilað í tryggingarskjalinum, fevnir tryggingin um føraran, sum er tryggingartakarin ella tann, sum við loyvi frá tryggingartakaranum nýtir akfarið.

50.4 Hvør hevur rætt til endurgjaldið

Rættin til endurgjald sambært hesum tryggingarskjali hevur

a) tann persónur, ið hevur fingið skaða, og sum tryggingin fevnir um, og,
b) um tryggjaði doyr, tey, ið sita eftir hann.

50.5 Hvar fevnir tryggingin um Sí § 3.3.

50.6 Hvat fevnir tryggingin ikki um

50.6.1 vanlukkutilburðir, ið henda, meðan akfarið verður nýtt til vinnuligt endamál, er leigað út ella verður nýtt uttan at tryggingartakarin veit av tí. Somuleiðis vanlukkutilburðir, ið henda persóni, ið hevur fingið akfarið latið upp í hendur til at selja, til umvælingar, eftirhyggjan (service), flutning, parkering ella tílíkt,

50.6.2 allar sjúkur og útloysing av loyndum sjúkraílegum, sjálvt um sjúkan er komin ella versnað av vanlukkutilburði; somuleiðis vanlukkutilburðir orsakaðir av sjúku, ella versnandi avleiðingar av verandi sjúku, sum av tilvild er komin uppí,

50.6.3 avleiðingar av læknaviðgerð, ið ikki var neyðug í sambandi við vanlukkutilburð, sum tryggingin fevnir um,

50.6.4 vanlukkutilburðir undir koyring við førara, ið ikki hevur galdandi koyrikort,

50.6.5 vanlukkutilburðir, ið koma av, at førarin er ávirkaður av rúsandi evnum sambært tryggingaravtalulógini § 20,

50.6.6 vanlukkutilburðir, ið førarin hevur elvt við vilja ella av grovum ósketni,

50.6.7 vanlukkutilburðir, ið standast av kríggi, uppreistri, borgaraófriði, jarðskjálvta í Føroyum ella í bardaga. Uttan mun til tað, sum omanfyri er nevnt, tekur tryggingin við vanlukkutilburðum orsakaðir av kríggi, har ikki stórveldini eru uppií, uppreistri ella borgaraófriði, ið henda í landi, har tann tryggjaði er staddur á frítíðarferð uttan fyri Føroyar í upp í 1 mánað frá tí, at ófriður tók seg upp.

Tað er ein treyt,

a) at frítíðarferð ikki verður løgd til land, har støðan er sum nevnt omanfyri
b) at tryggjaði ikki sjálvur er uppi í hendingunum (valdsgerðunum),
c) at vanlukkutilburðurin ikki er elvdur av kjarnorkuspreinging,

50.6.8 vanlukkutilburðir, sum standast av luttøku og venjing í motorkappingum av øllum slag,

50.6.9 vanlukkutilburðir, ið henda á rannsóknar- og kanningarferðum.

50.6.10 tá tað er møguligt at fáa endurgjald frá kendum skaðavoldara, ið kann ábyrgdast fyri skaðan.

50.7 Hvussu verður endurgjaldið ásett

50.7.1 Endurgjaldið verður ásett sambært tí til eina og hvørja tíð galdandi lóg um endurgjaldsábyrgd, hóast eingin kann ábyrgdast fyri skaðan.

50.7.2 Tryggingin veitir endurgjald til:

Førara fyri:

- Útreiðslur til lækna, heilivág og flutning í sambandi við viðgerð (§ 1)
- Annan miss orsaka av skaðanum (§ 1)
- Mista arbeiðsinntøku (§ 2)
- Svía og pínu (§ 3)

Akfarstrygging

- Varandi avlamni, tá heilsustøðan hjá skadda er vorðin støðug (§ 4)
- Mist vinnuføri, tá skaðin hevur viðført varandi niðurskurð í førleikanum hjá tryggjaða at vinna sær pening (§§ 5–9)

Avvarðandi fyri:
- Miss av forsyrgjara og jarðarferðarhjálp (sambært skjalprógvi) (§§ 12 -14)
- Tillagingarupphædd (§ 14a)

50.7.3 Fær skaddi endurgjald frá arbeiðsskaðatryggingini, verður hetta endurgjaldið drigið frá í endurgjaldinum frá tryggingini móti fólkaskaða.

50.7.4 Fær skaddi endurgjald frá aðrari vanlukkutrygging, verður henda upphædd ikki drigin frá endurgjaldinum frá tryggingini móti fólkaskaða.